EDMUND JACOBSEN
SAVNSMYND

# Væntandi fokus á KT-trygd í vinnulívinum

Nógvar føroyskar fyritøkur fara ov lætt um trygdina, heldur KT-grannskoðari. Mannagondir og avtalur við veitarar verða ikki raðfestar nóg ovarlaga.

Føroyska vinnulívið er væl við, tá ið tað snýr seg um at verja seg mótvegis virus og teldusníkum. Men oftani hava virkini sera stórt álit á persónar frá KT-fyritøkum, ið hava atgongd til ambætarar, netverk og teldur á virkinum.
Soleiðis ljóðar niðurstøðan frá Jóhan Martin Jacobsen, KT-grannskoðara hjá grannskoðara virkinum Rasmussen og Weihe.
– Vit hava nógv smá virki í Føroyum, og hesi hava ikki orku til at hava egin KT-starvsfólk. Tað merkir, at virkini ofta hava samstarv við KT-veitarar um at viðlíkahalda og dagføra teldur og ambætarar, sigur Jóhan Martin Jacobsen.
– Tað er mín fatan, at virkini hava sera stórt álit á hesum persónum uttan at hava fastar karmar fyri hesum samstarvi. Teir hava ofta atgongd til so at siga allar innanhýsis upplýsingar, og møguleikin fyri at misnýta hesar upplýsingar er tískil altíð til staðar. Sum grannskoðari sakni eg greiðar avtalur millum veitarar og virki um, hvussu teirra samstarv skal vera, og hvussu upplýsingar eiga at verða handfarnar, sigur Jóhan Martin Jacobsen víðari.

**Tørva mannagongdir**
Tað er við øðrum orðum sjáldan ítøkilig trygd artiltøk á týðandi økjum, ið liggja á láni hjá føroyskum fyritøkum, men heldur vantandi mannagongdir og avtalur, ið ikki verða raðfestar ovarlaga.
– Tær flestu føroysku fyritøkurnar hava góða verju mótvegis til dømis virus og innbrotum. Tað er sera sjáldan, at ein frættir um fyritøkur, ið eru hart raktar av virus. Har hevur samstarvið við KT-veitarar givið góð úrslit, heldur Jóhan Martin Jacobsen.
Hann leggur afturat, at so at siga øll virkir hava eitt tætt samstarv við KT-veitarar. Sum oftast hava tey stóru virkini egin KT-starvsfólk, men heldur ikki tey stóru virkini hava lagt seg eftir at skjalfesta samstarvsavtalur við veitarar.
– Hjá tí almenna er fokus á mannagongdir økt nógv seinnu árini, sigur Jóhan Martin Jacobsen.
– Sum heild má sigast, at føroyska vinnulívið er eitt sindur aftanfyri, tá ið tað snýr seg um mannagongdir og avtalur. Her stendur menn ingin so at siga í stað, sigur hann at enda.

### EDV-POLITIKKUR FYRI SMÆRRI VIRKI

**Hjá eini lítlari fyritøku er ikki neyðugt við einum umfatandi edv-politikki. Men fastar mannagongdir eiga at vera, sum í minsta lagi tryggja hesi málsøkir:**

1. **trygdarkopiering (back-up)**
2. **viruseftirkannan**
3. **atgongdseftirlit**

**Les meira um góða KT-trygd fyri smærri fyritøkur á heimasíðuni hjá Rasmussen og Weihe: www.rasmussen.fo**



## YMISKAR HÓTTANIR MÓTVEGIS TELDUNI

**Hóast telduvirus koma í túsundatali í ymiskum hamum, so er í roynd og veru bert talan um broyttar útgávur av gomlum hóttanum. Tað er ikki einans virus, ið ein skal ansa eftir – aðrir vandar lúra eisini. Niðanfyri eru nakrir av teimum best kendu.**

**Telduormur**
Telduormar eru forrit, ið margfalda seg sjálvi. Síðani nýta tey netverk fyri at spjaða seg til aðrar teldur og ambætarar. Samanborið við telduvirus, so nýtist einum telduormi ikki at knýta seg at nøkrum øðrum forriti fyri at spjaðast. Telduormar gera so at siga altíð skaða á netverk, hóast skaðin ofta einans er, at ferðin á netverkinum minkar. Telduormar eru fyrstu ferð nevndir í einari science fiction skaldsøgu, sum kom út í 1975. Fyrsti telduormurin var skaptur av granskarum frá Xerox í 1978.

**Telduvirus**
Telduvirus eru forrit, ið margfalda seg sjálvi, uttan at eigarin av teld-uni nýtist at hava nakran varhuga av hesum. Fyri at spjaða seg skal telduvirus brúka antin eitt annað forrit ella ein disk av onkrum slag. Oftani spjaðast virus umvegis alnet og teldupost, men sera ymiskt er hvussu stóran skaða, tey hava við sær. Summi skapa einans eitt sindur av órógvi við at gera brúkarin varhugan við, at tey eru á telduni – men umframt hetta gera tey ongan skaða. Onnur telduvirus eru sera skaðilig og kunnu oyðileggja forrit, strika skjøl ella strika alt, ið liggur á harðdiskinum. Fyrsta virus sá dagsins ljós í 1983.

**Phishing**
Phishing er ein lutfalsliga nýggj hóttan, ið er komin saman við øktu nýtsluni av alnetinum. Phishing kemur av enska orðinum fishing, og snýr seg um persónar, ið ”fiska eftir” loyniligum upplýsingum hjá øðrum teldunýtarum fyri síðan at misnýta hesar til egnan vinning. Ein vanligur háttur er at senda teldupost, har ið brotsmaðurin sigur seg verða til dømis frá einum kendum alnethandli. Boðini kunnu vera, at skrásetingin í handlinum skal dagførast, og tískil verður biðið um brúkaranavn og loyniorð. Tey, ið lata hesi frá sær, kunnu verða vís í, at tey verða misnýtt. Fyrsta skrásetta hending við phishing fór fram í 1995.

**Teldusníkar**
Hetta heitið verður nýtt um persónar, ið ólógliga troka seg inn í telduskipanir við at sníkja seg uttan um trygdarskipanir – antin til stuttleika ella fyri at stjala upplýsingar. Slíkt virksemi krevur stóra vitan og kunnleika um teldur, og tað hendir seg tí ofta, at fyrrverandi teldusníkar seinni gerast trygdarserfrøðingar fyri fyritøkur ella almennar stovnar. Teldusníkar byrjaðu av álvara at gera um seg í áttatiárunum, og í 1983 fekk USA lóggávu mótvegis slíkum virksemi.

**Spam**
Spam er felagsheitið fyri óynsktan teldupost og er í dag eitt fyribrygdi, ið rakar so at siga øll, ið nýta teldu við atgongd til alnetið. Sum so er spam meira argandi enn vandamikið, men tey, sum senda út henda óynskta teldupost, nýta ofta teldur hjá øðrum til hetta virksemið.

T
RÁÐUR
N